VIÐMERKINGAR

# Kærkomin fíggjarligur konjunkturslættari!

**Føroyska samfelagið hevur havt skiftandi stuðlar at rilla á og nógvar høkjur at lofta sær við - ein stuðli, sum ofta verður lopin um, er donsku kríggsveitingarnar, sum eftirhondini er týðandi partur av tí spinkla føroyska fíggjargrundarlagnum**



**Virgar T. Dalsgaard**

Flestøll minnast, hvussu fullveldismenn beint fyri hetta aldaskiftið breggjaðu sær av, at vit skuldu hava fótað okkum aftur bæði skjótt og væl eftir kreppuna fyrst í 90'unum! Men hetta var ein illusión, ein sminkaður veruleiki! Sum so ofta áður vóru tað bara læntar fjaðrar, teir pyntaðu seg við!

Loysingarliðið tagdi burtur teir framúr góðu konjunkturarnar við ovurhonds fiskaprísum, umframt donsku hjálpina við stórum láníveitingum og eina beinleiðis danska milliardforering í sonevnda bankamálinum! Við slíkum odds og sovorðnum undanvindi skuldi verið strævið at kunna dumma seg.

Kortini eydnaðist tað fullveldisstýrinum við harra H.H. sum ideologi og Karsteni Hansen sum fíansheysi at forkoma øllum ríkidømi við *hvørki at investera* í nakað vinnuskapandi tiltak og *heldur ikki konsolidera* seg við at viðlíkahalda bygningar, skip, amboð og aðrar ognir. Tvørturímóti _ teir rændu danska blokkpeningin, sum varð ætlaður føroyska veljaranum og settu hann inn í láturligar loysingargrunnar sum steindeyðan kapital, meðan alt produktiónsapparatið krypladist og forfall. Sjálvt ambulancur steðgaðu upp á veg til sjúkrahúsini, tí tær ikki kundu fáa neyðugan umvælingarpening frá fullveldismonnum!

Teir førdu ein ábyrgdarleysan, fantasileysan og turrgeldan politikk, eiðasøran fyri aðrar visiónir enn dagdreymin um eina fjákuta tjóðveldisrepublikk - eitt ivingasamt túsundársríki, sum einki fundament hevði í veruleikanum. Teir irrationellu fantastarnir stevndu ímóti einum ússaligum, men deyðiligu farligum ***fata morgana***, sum heldur ikki *rationelt* hugsandi tjóðveldismenn trúðu uppá sjálvir!

Hesir ábyrgdarleysu menn sótu sum passivir áskoðarar og bara eygleiddu, at vinnan, hóast rekordmøguleikar, minkaði; - virkini stagneraðu, almennir bygningar forfórust, og útjaðarin máaðist burtur. Fyri at leggja stein oman á byrðu sluppu teir okkara ringastu konkurrentum, - íslendingum - at eyðræna føroyskan marknaða og føroyskar fyritøkur!

*Men við tað, at fyrst og fremst donsk banka_milliardinnsprænging fekk gerandisforbrúkið, sethúsabyggingina og innflutningin at bólgna, loyvdu teir sær kortini við sjáldsomum frekleika at reypa og lata væl at fíggjarstandinum.*

### Ein milliard í kríggspensión

Men …. Tann «*holli*» fíggjarstandurin var ein hvørvisjón! Hann var ikki reelt funderaður, og hvíldi á beinleiðis danskari kreppuhjálp! Og tað var ikki nógmikið við tað! Umframt allar hinar donsku veitingarnar, komu ***krígspensiónirnar júst fyrst í 90unum*** - eisini fíggjaðar beinleiðis úr Danmark!

Akkurát tá ið kreppan var allarringast (1993), fingu teir føroyingar, sum høvdu siglt undir krígnum og einkjur teirra fyrstu ferð útgoldna eftirløn fyri krigs-siglingina! Og hesar veitingar hava burtursæð frá fyrsta árinum (1993) støðugt ligið omanfyri 80 milliónir um árið líka fram til 2003, tá ið veitingarnar komu eitt sindur undir 80 milliónir árliga, tí fleiri av pensionistunum ikki meira eru á lívi!

Tá ið økonomar, sum summir føroyingar eyknevna búskaparfrøðingar, hava tosað um kapitalfluttning, hava teir flestu fulkomuliga ignorerað týdningin av kríggspensiónunum! Tær komu í tøkum tíma sum lýsi á brotasjógv og beinleiðis kvettu teir negativu amplitudutopparnar á fíggjarkurvunum miðskeiðis í 90unum, meðan veitingarnar forsterkaðu tær positivu amplitudurnar á konjunkturkurvunum undir fullveldisgonguni! Hetta var reelt ein substantiel øking av *blokkinum*!

Niðanfyri loyvi eg mær eftir keldu hjá *Ríkisumboðnum í Havn* at seta upp eitt yvirlit um kríggspensiónirnar frá 1993 til 2005:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1993 | 35,3 mill. | 2000 | 86,8 mill. |
| 1994 | 100,5 mill. | 2001 | 84,3 mill. |
| 1995 | 88,6 mill. | 2002 | 81,8 mill. |
| 1996 | 85,7 mill. | 2003 | 78,2 mill. |
| 1997 | 86,9 mill. | 2004 | 75,1 mill. |
| 1998 | 85,3 mill. | 2005 (meting) | 72,0 mill. |
| 1999 | 84,4 mill. | | |
| | | Tilsamans | 1.044,9 mill. |

Sostatt geva hesar upphæddir til og við í ár væl ***yvir eina milliard krónur***, sum eru beinleiðis spreindar út í føroyska samfelagið uppá sløk 13 ár. Fyri Danmark hevði hetta svarað til at fingið góðar 100 milliardir forerandi ella *einar fýra/fimm stórabeltsbrýr* í senn!

Hesin peningur hevur ikki verið deyður uppspardur kapitalur á bankabók, tí hann kom júst til teirra, sum høvdu brúk fyri peningi at supplera fólkapensiónina við - hesin peningur hevur verið til gerandisforbrúk og hevur tí verið ein týðandi *konjunktur-útjavnari* í føroyska samfelagnum, serliga miðskeiðis í 90-unum!

Men so smáligir vóru teir ráðandi, at teir skarvaðu burtur av fólkapensiónini hjá kríggspensionistunum, fyri at føroyski landskassin skuldi spara pening. Skattavaldið skar fólkapensiónina hjá kríggseinkjunum niður á minimumsupphædd! Ein ómanslig, óforstáilig og asocial skemdargerð!

Tey seks árini, fullveldismenn sótu við valdi, fingu teir úr Danmark eina hálva milliard pumpaða út í føroyska samfelagið via kríggspensiónir! Sig so, at teir ikki hava verið forkelaðir av dønum!

### Í fíggjarligum andgletti

Teir menn, sum í síni tíð fingu danska statin at rinda kríggspensiónir til føroyingar, eiga stóra tøkk uppiborna og sama eiga danskir skattaborgarar, sum gjalda, men føroyska skattavaldið, sum troystar sær at mótrokna *í fólkapensiónini hjá fátækum kríggspensiónistum*, skal onga tøkk eiga! Og eftirsum onkur hevur fingið ta løgnu fatan, at tað eru onglendingar, sum hava nakað við kríggspensiónirnar at gera, so lat tað hervið verða sligið fast við fimmtummaseymi, at onglendingar ikki lata føroyingum eitt einasta oyra í kríggspensión, - tað gera bara danskir skattgjaldarar!

Tey komandi árini fer henda kelda at torna, tí talið av kríggspensionistum støðugt minkar - hetta fer at problematisera arbeiðið hjá núverandi landsstýrissamgongu enn meira! Nú ið konjunkturarnir ikki eru til vildar og vinnugrundarlagið rillar, høvdu slakar 85 milliónir um árið verið sum fíggjarligt medicin og heilsubót fyri okkara samfelag! Men longu í næsta ár er vandi fyri, at pensiónirnar fara væl undir 70 milliónir!

Føroyingar mugu gera sær greitt, at hetta landsstýrið hevur beinleiðis fíggjarliga mótibrekku á øllum økjum! Tað er ikki bara kombinatiónin av vánaligum vinnukonjunkturi og ábyrgdarleysum blokkniðurskurði, sum meltar okkum; - men ekstremt hækkandi orkuprísir og harumframt minkandi kríggspensiónir. Alt má takast við í samlaðu myndina av fíggjarligum andróðri. Við so vánaligum útlitum kann eingin krevja javnvág á fíggjarlógini. Hon má og skal undirbudgetterast fyri at fáa samfelagið aftur í gongd!

# Nú bíði eg bara eftir ljósareyða trýkantinum!

**Beinta Løwe Jacobsen**
*journalistur*



Enn einaferð verða vit samkynd forfylgd av umboðum fyri tær almennu Føroyar. Haldi tað er ótrúligt, at tað eru fólkavald, ið ganga á odda at forfylgja samfelagsbólkum í einum demokratiskum samfelagi. Trúi bara at hetta var galdandi í londum uttan demokrati, men kanska eru føroyskir politikarar ikki petti betur enn Saddam Hussein, Pinoché, Pol Pot, Idi Amin, Stalin o.s.fr.

Umframt jødar og onnur vórðu eisini samkynd forfylgd av Hitler undir Seinna Heimsbardaga. Samkynd vórðu eyðmerkt við einum ljósareyðum tríkanti, og nú siti eg bara og bíði eftir at fáa boð úr Innlendismálaráðnum um, at eg skal møta upp úti í Tinganesi at fáa ein ljósareyðan tríkant tatoveraðan á pannuna, tí eg eri samkynd. Krevst ein løgtingssamtykt til at fáa hetta ígjøgnum, vænti eg ikki, at tað verður nakar trupulleiki, tí tað tykist ikki sum um at nakar av løgtingslimunum hevur hug ella dirvi at tala at tí partinum av almennu Føroyum, ið forfylgja okkum samkyndum.

# Politisk hjartasorg eitt haft um beinið

**Heðin Mortensen**
*borgarstjóri*



Tað er nógv fyri, at bløðini skulu leggja síður til kjak á so lágum støði, sum hetta kjakið um fartelefonir til býráðslimir og deildarleiðarar. Tí harmar tað meg almikið at brúka enn meira pláss til hetta. Men Beate hevur, í onkrum sum líkist poitiskari hjartasorg, ført líkt og ólíkt fram, sum eg ikki kann lata standa ósvarað.

Beate tosar um, at býráðslimir fáa fartelefonir. Hetta er ikki so. Eins og býráðslimir læna teldur frá kommununi, so fáa teir nú eisini fartelefonir til láns. Hetta er ikki ein gáva, men eitt neyðugt arbeiðsamboð, sum verður latið til nýtslu. Kommunan brúkti undir síðstu samgongu, sum eg og Beate sótu í, heilt fitt av peningi til eina sms-skipan, sum flytir stórar partar av samskiftinum til sms-boð á fartelefonum. Boð til teirra, sum ikki sita bundin við eina kommunala teldu, verða í løtuni borin um hesa skipan t.d. Starvsfólk, sum arbeiða úti ymsastaðni í kommununi. Skipanin verður nú útbygd til eisini at fevna um fundarboð, avboð og aðrar broytingar.

Um Beate vil tað ella ei, so liva vit í 2005, og fartelefonin og nú eisini farteldan, sum fleiri býráðslimir hava valt, er vorðin gerandiskostur, eitt vanligt arbeiðsamboð og eitt neyðugt samskiftistól. Við fartelefonini ert tú ikki longur bundin av staði og við smsboðunum heldur ikki av tíð. Tórshavnar kommuna er eitt modernað arbeiðspláss, og hóast ein einstakur býráðslimur ikki vil fylgja við tíðini, kann øll kommunan ikki steðga upp.

Beate sigur, at hon hevur sagt frá, at hon ikki vil hava eina fartelefon. Hetta er partvíst rætt, men hetta var sagt í práti, sum eg fataði meira sum skemt enn álvara. Hon fekk eini skrivlig boð um at koma eftir telefonini, men hon hevur ikki skrivliga sagt nei takk. Tað hevur eingin býráðslimur gjørt, og var tað hetta, eg meinti við í samrøðuni við Dimmalætting.

Eg vóni, at Beate skjótt aftur fer at nýta sína orku upp á konstruktivt býráðsarbeiði, og at hetta lúnuta keglið heldur uppat. Tað tænir ongum endamáli og byggir einki upp, so heldur enn at brúka meira bladpláss til hetta úttømda pinkuevni, átti hon at brúkt sína tíð til tað, hon er vald til, nevniliga býráðspolitikk, ið røkkur út um fartelefonir og onnur smáting.